

*Jóannes Eidesgaard ivast ikki í, at tey, sum mynda flokkin í dag, verða trýst grundað á veljarakanningini, sum gav Javnaðarflokkinum eitt keðiligt úrslit*

# Javnaðarflokkurin landsstevnu

**Um vikuskiftið hevur Javnaðarflokkurin landsstevnu, og serliga keðiliga veljarakanningin verður á skránni**

LANDSSTEVNA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Vanliga er ilt at siga, hvat orðaskifti á einum landsfundi fer at snúgva seg um. Men hjá Javnaðarflokkinum er skjótt at staðfesta, at eitt mál verður keðiliga veljarakanningin fyri flokkin, sum varð gjørd fyri tíð síðan.

- Tað er givið, at vit sum mynda flokkin í dag verða sett undir eitt ávíst trýst av hesi kanningini, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður í flokkinum.

Hinvegin verður eisini ein meira hugnaligur partur á skránni á landsstevnuni, og tað verður í kvøld.

Í morgin verður formansfrágreiðing, har formaðurin fer at greiða frá, hví Javnaðarflokkurin er til, umframt, at hann fer at nerta við onnur mál. So sum Føroyska búskapin, sum hann metir, at tað skulu munandi tiltøk til, fyri at stabilisera.

# Sjálvstýrisflokkurin landsfund

**Í morgin hevur Sjálvstýrisflokkurin landsfund. Og í formansfrágreiðingini fer Kári P. Højgaard at leggja dent á at orð og gerðir hjá samgonguni ikki samsvara**

LANDSFUNDUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Kári P. Højgaard harmast at flokkurin ikki er í samgongu, men hann hevði ikki vilja verið við verandi samgongu*

Sjálvsstýrisflokkurin hevur landsfund í Vestmanna í morgin.

Kári P. Højgaard skal halda formansfrágreiðing, og í høvuðsheitum fer hann at greiða frá, at Sjálvsstýrisflokkurin hevur hildið sínar ætlanir, og at onki samsvar er millum orð og gerðir hjá samgonguni.

Somuleiðis hevur Sjálvsstýrisflokkurin kallað inn Jóannes N. Dalsgaard at greiða frá fíggjarlógini, tí teir vilja hava ein samfelagsfrøðing at seta fram síni sjónarmið um tað, sum gongur fyrisegífíggjarlógarsmíðnum í løtuni.

Somuleiðis verður kjak um politikkin hjá flokkinum, men formaðurin heldur ikki, at flokkurin er miseydnaður, hóast hann situr í andstøðu.

- Vit fóru til val við nøkrum lyftum, og hóast politikkur er vald, so hava vit valt at vera í andstøðu, tí vit ikki kunnu taka undir við ovurhonds stóru íløgurnar, sum samgongan ætlaði, og tí hava vit hildið orð, sigur Kári P. Højgaard, formaður Sjálvsstýrisfloksins.

